# 90 ÁRA GAMAL OG ROKAST ENN Í FERÐAVINNUNI

HÓAST SÍN **HØGA** ALDUR ER HANN **FRAMVEGIS** VIRKIN **HVØNN** DAG Í **FERÐAVINNUNI**. Í **SUMMAR** SKAL **SIGURD SIMONSEN** Í HOYVÍK TAKA ÍMÓTI 23 **FERÐAMANNASKIPUM**, IÐ KOMA TIL **FØROYA**, OG HVØRJA FERÐ ER **NÓGV** AT GERA, TÍ FERÐAFÓLKINI VILJA SLEPPA **ÚTFERÐIR** KRING LANDIÐ. – EG SKULDI LANGT SÍÐAN VERIÐ **GIVIN** VIÐ HESUM, MEN EG **KANN** IKKI LATA VERA, TÍ TAÐ ER SO **SPENNANDI**, SIGUR HANN



**SAMRØÐA**
Uni Arge
uniarge@gmail.com

Mikumorgun. Á Garðavegi 2 í Hoyvík andar alt av friðsælu. Sólin skínur, og lýkka er í luftini. Ringdi til Sigurd Simonsen á Hoyvíking Tours í gjár at biðja um eina samrøðu. Nei, tað visti hann ikki rættiliga. Tveir minuttir seinni var avtalan í hús, og kl. 10.00 skuldu vit so hittast.

Sigurd tekur fryntligur ímóti og bjóðar kaffi og rundstykkir. Á stovuborðinum liggur ein snotilig bók um 293 metrar langa og 13 hæddir høga ferðamannaskipið, Poesia, sum skuggaði fyri Havnini mánadagin. Sigurd stóð sjálvur fyri vitjanini og fegnast um, at alt gekk so væl, sum tað gjørdi.

– Veðrið var sera gott mánadagin, og tí kundi skipið leggja at á Molanum. Hevði skipið komið týsdagin, tá væl av vindi var eystaneftir, hevði skiparin ikki lagt at, og helst hevði hann heldur ikki sett bátarnar út. Vit vóru ótrúliga heppin, sigur Sigurd og brosar um alt andlitið.

Sjónligt er, at hann framvegis brennir nógv fyri móttøkum sum henni mánadagin.

Heilt síðan í mai 1956, tá Føroya Ferðamannafelag setti hann sum leiðara á Ferðamannastovuni undir Hotel Hafnia, hevur hann verið virkin í ferðavinnuni.

Í teirri tíðini vóru ikki so nógv fremmand ferðafólk í Føroyum sum nú, og ferðamannaskipini, ið vitjaðu oyggjarnar, vóru ongi. Fyri seinna heimsbardaga komu eini 4-5 skip til Føroya um árið, men so kom kríggið, og stóru skipini sóust ikki aftur fyrr enn í 1959, minnist hann.

> Norðuratlantshavið er trygg farleið, tí her gera ongir sjórænarar ónáðir. Helst koma fleiri ferðamannaskip tí hendan vegin

### Leitaði eftir soninum

Á Ferðamannastovuni var tó nógv at gera. Tjaldrið hjá Skipafelagnum, Hekla hjá Skipaútgerð Ríkisins og Dronning Alexandrine hjá DFDS sigldu í fastari rutu upp á Føroyar, og nógv fólk stukku inn á gólvið á Ferðamannastovnuni, ið seinni flutti oman á Kongabrúnna.

– Tá vóru so fáir vegir í Føroyum, at vit gjørdu næstan bert útferðir til Kirkjubøar, sigur Sigurd og leggur á borðið ferðaætlanirnar fyri skip, bátar og flogfør, ið hann gjørdi hvørt ár og sendi øllum ferðaskrivstovunum í Norðurlondum. Tær vóru góð reklama fyri Føroyar.

Í ferðaætlanunum vóru nógvar lýsingar. Føroya Banki, Sjóvinnubankin, Tryggingarsambandið og aðrar stórar fyritøkur hildu allar, at hetta var rætta staðið at lýsa. Eisini Auto, Óli Arge og Tórshavnar Svimjihylur lógu framvið at gera vart við seg.

Sigurd minnist, at fyrstu fólkini, ið stukku inn á gólvið á Ferðamannastovuni, tá hann byrjaði í mai 1956, vóru tvær kanadiskar kvinnur. Onnur var móðir og hin systir ein av monnunum, sum doyðu við kanadiska flúgvaranum, ið rendi á inni á Viðvík 23. apríl í 1943.

– Tær vóru komnar til Føroya at síggja grøvina, og mín uppgáva tann dagin var at skipa so fyri, at tær sluppu at síggja allar gravirnar í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, sigur Sigurd.

Tað løgna var, at samstundis sum flúgvarin datt niður, var Sigurd sjálvur staddur á Viðareiði. Hann og systkinabarnið, John í Mykinesi, vóru farnir til Viðareiðis skírisdag, og langafríggjadag høvdu tey í húsunum hoyrt dun frá flogfari. Veðrið hendan morgunin var frálíka gott, men tokan lá niður um miðjuna av Malinsfjalli. Ikki fyrrenn Sigurd var komin aftur til Klaksvíkar, frætti hann um sorgarleikin.

### Vildi síggja lunda

At Sigurd Simonsen tíðliga hevur verið hugtikin av stórum skipum, sæst á myndunum, hann vísir fram. Ein mynd er tikin 17. mai í 1937 av Smirli, sum er á veg til Suðuroyar. Við síðuna av Smirli sæst franska marinuskipið, Jeanne d'Arc, sum hevði lítið flogfar við sær, ið fleyg yvir Havnini.